## DAGSINS MEINING

# Láturligt og grátuligt

Tað er ikki óvanligt, at løgmenn stilla upp til fólkatingið. Men tað er óvanligt, at løgmaður og varaløgmaður, sum í eitt heilt valskeið hava halgað sína politisku karrieru til at kvetta bondini við Danmark, stilla upp til danska fólkatingið. Hetta er ein so grotesk støða – hon er so láturlig og grátulig – at ringt er at finna orð fyri henni. Eftir at hava prædikkað fullveldi og roynt at skapa skilnað millum føroyingar og danir biðja løgmaður og varaløgmaður nú Føroya fólk um at velja seg á fólkating. Endamálið hjá løgmanni og hansara fólki er at gerast partur av donskum innanríkispolitikki. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so royna somu flokkar, ið annars siga seg arbeiða saman í landsstýrinum í sátt og semju og sum vilja halda fram í hesum samstarvi eftir næsta løgtingsval, eisini at billa fólki inn, at valið um fólkatingskandidatarnar stendur millum hesar somu flokkar. Tjóðveldisfólk gera sín samstarvsflokk til fíggindan. Og sama er galdandi fyri Fólkaflokkin. Eftir at fólkafloksleiðslan nú í longri tíð hevur brúkt mestu orku sína til at vísa ónøgd sína við Tjóðveldisflokkin – so siga somu røddir av landsfundi floksins í Klaksvík, at best hugsandi og skilabesti samstarvsflokkurin eftir valið er Tjóðveldisflokkurin.

Her ruggar ikki rætt. Okkurt heilt alvorligt bagir logikkinum. Ella kanska er tað bara Fólkaflokkinum líkt. Fyrst at fyrigykla fólki, at Tjóðveldisflokkurin er størsti fíggindin til fólkatingsvalið fyri síðani í sama viðfangi at siga, at hann er rætti samgongufelagin eftir løgtingsvalið. Hevði tað ikki verið meira ærligt at spælt út við veruleikanum: at Fólkaflokkurin bara hevur havt trupulleikar í samvinnuni við Tjóðveldisflokkin! Ella er veruleikin kanska tann, at hetta bara eru pátiknir trupulleikar, tí Fólkafloksleiðslan alla tíðina hevur fingið sín vilja í Tinganesi!

Fólkaflokkurin ber ótta fyri, at fullveldisveljarar hansara skulu rýma í Tjóðveldisflokkin. Og fyri at fyribyrgja tí og sissa hesar letst fólkafloksleiðslan sum um, at hon helst sær eina samgongu saman við Tjóðveldisflokkinum.

Og nú fólkatingsval er útskrivað og altumráðandi er at fáa Óla Breckmann afturvaldan tveita somu fólkafloksmenn ein av sínum mongu gekkskortum og vísa sítt sanna andlit. Tað er lítið sømiligt fyri politiskar flokkar at spæla hund við Føroya fólki á henda hátt. Løgmaður hevur verið eitt virðiligt umboð fyri Føroya fólk úteftir, men tað er óseriøst og óvirðiligt, tá sami løgmaður á landsfundi floksins – eftir at klandurið í samgongini er vorðið so nógv, at tosað verður næstan ikki saman – ger greitt, at Tjóðveldisflokkurin er rætti og náttúrligi samstarvsflokkurin. Valstríðið hjá ÓB fer alt at byggja á eirindaleysa útspilling av Tjóðveldinum, sama flokki, sum sami maður á landsfundinum hevur útnevnt til samstarvsflokk eftir løgtingsvalið. Her síggja vit, hvussu skitin politikkur er.

**Sosialurin**

## Fólkatingsvalið 2001

# Konfrontasjón ella samstarv?

**Jóannes Eidesgaard**
*fólkatingsmaður*



Konfrontasjónir, sum vit hava sæð so nógvar av seinasta valskeiðið millum landsstýrið og donsku stjórnina, geva ongantíð úrslit, sum báðir partar eru nøgdir við. Konfrontasjónin hevur bert ein vinnara, og hesin er gjarna tann størri og tann sterkari, meðan hin parturin er taparin, sum snøgt sagt liggur eftirá.

Eitt annað, sum eyðkennir konfrontasjónina er, at hon sjáldan er undirbygd og umhugsað. Hon eigur sjáldan góðar grundgevingar. Konfrontasjónin er seinasta loysnin, konfrontasjónin kemur, tá vit og skil ikki røkka longur. Konfrontasjón er tekin um ómegd. Men verður konfrontasjónin vald, tí teir, sum taka avgerðirnar, hava brúk fyri einum stemningi, sum konfrontasjónin gevur, tá er lítið gott at vænta sær.

Nú vil Fólkaflokkurin gera tað til, at teir ikki vildu vita av konfrontasjónum við danir, men kasta Tjóðveldisflokkinum fyri, at tað eru teir, sum vildu hava tað soleiðis, sum tað bleiv. Men, álvaratos, heldur Fólkaflokkurin, at føroyski veljarin er so stuttmintur og so góðtrúgvin, at hann gloypir hesum. Nei, hetta hava báðir samgonguflokkarnir verið saman um. Tit hava verið sum lív og ein sál í tykkara konfrontasjónspolikki mótvegis bæði donskum myndugleikum og føroysku andstøðuni.

Eg haldi so avgjørt ikki, at Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin í einum møguliga avtalaðum spæli skulu sleppa at undirhalda veljaran fram til fólkatingsvalið við at skjóta hvør eftir øðrum um hetta. Í fullveldismálinum hava teir drigið somu línu, og konfrontasjónirnar er teirra egna barn.

So tá valið snýr seg um samstarv ella konfrontasjón, so umboða hasir báðir flokkarnar so sára samdir konfrontasjónina, meðan andstøðan og fyrst og fremst Javnaðarflokkurin umboða samstarvið. Minnast tit forrestin, hvør tað var, sum ikki vildi hitta danska forsætismálaráðharran, tá hann vitjaði í Føroyum í januar 1998? Jú, tað vóru fyrst og fremst hesir báðir, Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, og síðan hava teir hildið stásið við líka.

Javnaðaflokkurin vil sum ikki einaferð vera tann fyrsti til at peika á eina kós móti samstarvi. Hetta gera vit, tí vit vita, at hetta er vegurin fram móti loysnum. Hetta gjørdi Javnaðarflokkurin m.a., tá samráðingar vóru um Heimastýrislógina. Tá gekk Javnaðarflokkurin á odda fyri at finna eina loysn, sum peikaði frameftir, meðan Fólkaflokkurin setti seg hendur í favn og einki gjørdi.

Og vit eru framvegis av tí føstu sannføring, at vit við góðum samstarvi við danskar myndugleikar verða førur fyri at finna bestu ríkisrættarligu loysnina. Og soleiðis sum mongu veljarakanningarnar seinastu tíðina hava víst, so er sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin tann loysnin, sum flestu føroyingar taka undir við. Og eg veit, at ein slík loysn verður ikki trupul at samráða seg fram til.

Trupulleikin beint nú er, at vit hava ikki eina samgongu, sum vil hava sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin, og henda trupulleika fáa vit ikki loyst fyrr enn til komandi løgtingsval. Hin vegin, so er tað als eingin orsøk til, at vit ikki beinanvegin framhaldandi tryggja okkum, at umboðanin á Fólkatingi kann verða ein rødd, sum talar søkina, sum flestu føroyingar ynskja.

Lat okkum tí enn einaferð taka neyðuga stigið 20 nov.

# Undirsjóvartunnil til Norðoyggjar

**Eivind Jacobsen**
*Fólkatingsvalevni hjá Norðoya Sambandsfelag*

Samgongutingmenn úr Norðoyggjum hoyrast bæði tíðliga og seint tosa um ferðasambandið til Klaksvíkar. Jógvan við Keldu, Rúna Sivertsen og Heini O Heinesen klaga dagliga um sambandið og nevna hetta sum sítt hjartamál. Nógv verður tosa, men lítið verður gjørt. Hví so er, veit eg ikki. Kann tað hugsast, at tey eru bangin fyri at loysa trupulleikan? Um tey gera tað, hvat skuldu tey so agitera við, til næsta val? Fyri norðingar er hetta ein óheppin gongd.

Tú skuldi trúð, at tá tey eru so positiv, hóast tey ikki sjálv megna at leggja fram uppskot, so tóku tey undir við skilagóðum uppskotum frá øðrum. Men so er ikki. Í seinastu viku legði m.a. Sambandsflokkurin fram uppskot um at seta pengar av til eyka skip til Klaksvíksleiðina. Hetta uppskot bleiv felt. Jógvan við Keldu tordi ikki at møta til 1. viðgerð, men til næstu viðgerð møtti hann og atkvøddi ímóti, saman við m.a. Rúnu og Heina.

Hesa vikuna kom uppskot um at avseta tær fyrstu 25 milliónirnar til undirsjóvartunnil til Norðoyggjar. Men aftur sóu vit, at samgongutingmenn úr Norðoyggjum, atkvøddu ímóti sínum hjartamáli.

Jógvan við Keldu fór so langt, at hann kallaði uppskotið óseriøst og at tað kom ikki upp á tal at taka undir við hesum uppskotið. Uppskotið bleiv felt av m.a. av trimum norðoya tingmonnunum.

Tí ivist eg onga løtu í, at norðingar duga at síggja hvør í tosar nógv, men einki avrikar. Tunnilin fer at kosta uml. 300 milliónir. Bummpengar fíggja í mesta lagið 100 mió. Tí er neyðugt at byrja beinan veg at seta pengar av, um tunnilin skal gerast veruleiki. Norðingar skulu gera sær púra greitt, at einasti flokkur sum kann tryggja at undirsjóvartunnilin verður gjørdur er Sambandsflokkurin.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## Fólkatingsvalið 2001

# Russisk roulette

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Nú er Høgni Hoydal enn einaferð farin at spæla við tøl. Í greinini Rangt og Rætt vísur hann á, at samgongan hevur, umframt at uppspara nógvar pengar í Landsbankanum, eisini økt útreiðslurnar á útvaldum økjum. Einki verður nevnt um at umlegging av láni og rentu er høvuðsorsøkin til avlopið. Búskaparliga framgongdin er øll brúkt til at økja raksturin. Høgni kundi eisini nevnt, at játtanin til almannamál er relativt lækka 2,1%!! Og hetta kalla teir framstig!

Høgni sigur, at eingin tosaði fyri 4 árum síðan um eldraøkið. Hetta er heldur ikki rætt. Edmund Joensen segði í Sjónvarpinum uppundir valið í 1994, at nú samfelagið var komið aftur á føtur áttu tey gomlu tørn.

Um sambandsflokkurin hevði verið í samgongu seinastu 4 árini, ivist eg onga løtu í, at avlamis og fólkapensjónin hevði verið 1000-2000 kr. hægri pr. mána enn í dag. (90-170 mió árliga) Minst 2 Røktar & ellisheim høvdu verið bygd (100mió eingangs) Hetta tí at sambandsflokkurin meinar at tey veiku eiga at fáa sín part.

Hetta hevði ikki hita búskapin upp. Sambandsflokkurin hevði nevniliga verið førur fyri at stýrt øðrum útreiðslum betur enn sitandi samgonga. Tað høvdu verið færri stressmappur í havnargøtum um Sambandsflokkurin sat á kassanum, men hvat ger tað?

**Sjálvstýrarin**

Karstin tosar um at stýra búskapinum. Meðan Karstin tosar og einki ger, eru rakstrarútreiðslurnar øktar 664 mió og íløgurnar 100 mió í 4 ár. Tá er ikki írokna eykajáttanir fyri komandi ár. Helst 100-200 mió. Ásannast má, at samgongan dugir munandi betur at brúka enn at spara.

Einasta orsøk til at sitandi samgonga einki hevur gjørt við tørvin á eldraøkinum er, at teir raðfesta fullveldi fram um vælferð. Høvdu teir havt skil fyri búskapi og annars havt vilja at stýrt, høvdu teir kunna spart á rakstrinum. Tað kundu teir so brúkt til vælferð, uttan at hita búskapin upp. Avlopið hevði tá eisini verið 600 mió. Í staðin brúka teir alla orku at tosa um fullveldi, meðan samfelagið syndrast.

Høgni sigur eisini, at komandi 4 árini fara teir at loysa teir trupulleikar sum eru á eldraøkinum. Hvussu megna teir tað. Í dag eru 18 mió í avlopi og teir duga ikki at spara. Harumframt ætlar Høgni at minka ríkisveitingina 621 mió. Tí manglar hann 603 mió. Tær skulu finnast fyrst. Síðan skal hann finna 100-200 mió til tey gomlu. Gott hevði verið, um Høgni hevði eitt boð uppá, hvør skal gjalda. Samgongan dugur ikki at stýra í góðum tíðum. Tað verður ikki léttari í ringum tíðum.

Annars kann eg fortelja Høgna, at tað er munandi tryggari at spæla Rangt og Rætt enn Russiska roulette.

# Vel virðiligt samband

**Annita á Fríðriksmørk**



Virðiligt samband millum Føroyar og Danir fæst einans við at vit taka fulla ábyrgd á øllum økjum. Her er talan um at taka ábyrgd á tí politiska, sosiala, búskaparliga og mentanarliga vígvøllinum. Tað merkir, at vit vilja rudda upp í frumskógini, sum tað sokallaða sambandið byggir á, og knýta eitt verðuligt og virðiligt samband við danir.

At røkka hesum málið krevst ein dugnalig telving. Tað nyttar onki at ganga runt har niðri, sum ein onnur finna og lata aðrar flyta teg politiskt. Tú noyðist at vita, hvagar leiðin gongur, og tú noyðist at flyta sjálvur.

Tí politikkur er beinharður, og tað er danskur politikkur eisini, og danskur politikkur mótvegis føroyingum er onki undantak í so máta.

- Tað er ongin loyna, at danskar stjórnir hava altíð tvíhildi um at varðveitt donsku ríkiseindina,
- tað er skrivliga prógvað, at peningurin til Føroya hevur havt eittans endamál, at gera okkum fíggjarliga heft av donskum pengum - men hvat hevur føroyska røddin á Danatingi sagt um hetta? Onki!
- tað er fleiri ferð prógvað, at danir fáa blokkin ferfalt aftur, - men hvat hevur føroyska røddin á Danatingi sagt um hetta? Onki!
- tað er prógvað, at danir ikki vilja viðurkenna okkum sum tjóð,- men hvat hevur føroyska røddin á Danatingi sagt um hetta? Onki!
- tað er viðtikið í Fólkatinginum í hesi tingsetu, at móðurmál okkara ikki skal viðurkennast sum tjóðarmál. Men hvat hevur føroyska røddin á Danatingi sagt um hetta? Onki! Tær ikki so frægt sum hirdu at verða til staðar og atkvøða.
- tað er prógvað, at Nyrup á einum landsfundi hjá danska Javnaðarflokkinum fyrr í valskeiðnum boðaði sínum veljarum frá, at alt sum hendi í samskiftinum millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýrið skuldi avtalast millum Pól Nyrup og Jóannes Ejdesgaard, og soleiðis ganga ímóti viljanum hjá fólkavalda meirilutanum í Føroyum- men hvat hevur føroyska røddin á Danatingi sagt um hetta? Onki!

Hetta vísir, hvønn leiklut hesar finnir hava havt í donskum politikki. Tær eru fluttar júst soleiðis, sum danska stjórnin ynskir. Tær hava tagt um tað, sum danska stjórnin heldur verða í so avdúkandi og óbehagiligt, og tær hava sagt tað, sum kann spilla antin Føroya Landsstýrið út ella Tjóðveldisflokkin.

Slíkt skaðar tað virðiliga sambandið, sum vit ynskja at byggja brúgv ímillum. Men tað virðiliga sambandið fæst ongantíð, so longi vit ikki hava ábyrgd á øllum økjum.

Hesum viðurskiftum vil ein føroyskt rødd á Danatingi greiða dønum frá. Ein rødd, sum hevur virðing fyri sær sjálvari og tí fólki her býr.

Vel Tjóðveldisflokkin.

# Yvirræðið yvir Føroyum

**Turið Sigurðardóttir**
*valevni fyri Tjóðveldisflokkin*

Spurningurin um framtíð Føroya verður svaraður í løgtingsvalinum í vár, men hjálandastøða okkara ger, at tá tað snýr seg um yvirræðið yvir Føroyum stendur stríðið ikki bara heima á landi. Nei, tað stendur eisini á danatingi, og tí skal Tjóðveldisflokkurin í Fólkatingið.

Tí, har sum tingast verður bæði opið og aftan hurðarbak um yvirræðið yvir Føroyum, har má Tjóðveldisflokkurin manna pall í stríðnum at verja og vinna ræði føroyinga yvir Føroyum. Tað er jú fremsta mál Tjóðveldisfloksins.

Tí hevur Tjóðveldisflokkurin átrokandi ørindi á røðarapall Fólkatingsins, har høviskliga at tala Føroya frælsis sak, har høviskliga og klókt at bera fram tað væl undirbygda kravið um fulla viðurkenning av tjóðarrættindum og harvið sjálvsavgerðarrætti okkara

Tí seta frælsishugaðir føroyingar x við E.


